# Violin verkætlan hjá Føroya Suz



*Béla og Tove Detreköy her saman við trimum av tonleikalærarunum í Musikskúlan um og einum av næmingunum*



*Béla leggur lag á*



*Tove gevur næmingunum eina hjálpandi hond*

TÓNLEIKUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Út ímóti 50 violinnæmingar vóru á verkætlanarskeið, sum Føroya Suzukifelag skipaði fyri næstseinasta vikuskiftið. Gestalærarar vóru Béla og Tove Detreköy. Tað vóru tey, sum upprunaliga byrjaðu at skipa Suzuki frálæru í Føroyum í 1996. Bæði Tove og Béla eru navnframir tónleikalærarar í Danmark, har tey búgva. Tey eru upplærd í Suzuki frálæruháttinum í USA, og tóku frálæruháttin við sær til Danmarkar í 1972.

Béla hevur staðið fyri størra partinum av útbúgvingini hjá føroysku Suzuki lærararnum Sámal Petersen og Anette Nielsen. Tí gleddi tað hjúnini almikið at koma aftur til Føroyar, at síggja úrslitið. Úrslitið varð sanniliga eisini vert at gleðast um. Violinirnar spældu vakurt, og tey nógvu glaðu børnini spældu fyri nógvu vælnøgdu áhoyrarunum.

Konsertskráin varð bygd upp eftir tí skrá, sum Suzuki frálæran tekur støðið í. Fyrst varð tað truplasta stykkið spælt, av teimum elstu børnunum, síðan kom eitt barn afturat, og eitt stykki, sum var eitt sindur lættari, varð spælt. Soleiðis helt tað fram, til øll børnini saman spældu "Twinkle, twinkle little star"

Tey elstu og royndastu børnini spældu alla skránna, og hetta er týdningarmikið sambært Suzuki frálæruni. Við at venda aftur til løtt stykki, sum tú veruliga dugur, lærir tú sera nógv. Tú ert meira fríur og hevur møguleika fyri at mennast.

Tey smærru børnini sótu og hugdu, meðan tey stóru framførdu. Hetta er eisini týdningarmikið, tey smáu læra nógv av at hyggja at teimum stóru, og við at